# Hægri lestur á Føroyamálsdeildini

Í september byrjar B.A.- og M.A.-lestur í føroyskum máli og bókmentum.

**B.A. í føroyskum máli og bókmentum**
Lesturin tekur trý ár og er skipaður í ein máltátt og ein bókmentatátt, umframt vísindaástøði og samskifti.

Endamálið við lestrinum er at ogna sær kunnleika til eldri og nýggjari føroyskt mál og bókmentir, umframt vísindaligt háttalag. Onnur norðurlendsk mál og norðurlendskar bókmentir eru partar av lestrinum.

Upptøkutreyt er students- ella HF-prógv. Onnur samsvarandi útbúgving kann góðtakast eftir umbøn í hvørjum einstøkum føri.

**M.A. í føroyskum máli og bókmentum**
Námið er tvey ára framhaldslestur fyri tey, ið hava lokið B.A.-prógv í føroyskum máli og bókmentum, og veitir serkunnleika í valdum málsligum og bókmentaligum evnum. Upptøkutreyt er B.A.-prógv í føroyskum máli og bókmentum.

Umsóknarfreistin til bæði námini er 1. juli 2004.

Nærri upplýsingar og umsóknarbløð fáast á:

**Føroyamálsdeildini**
**Fróðskaparsetur Føroya**
V. U. Hammershaimbsgøta 16 · Postrúm 272
110 Tórshavn · tlf. 352520 · fax 352521
og á www.setur.fo

HJÁ GUNLEIVI

## Bakaralærlingur

Søkt verður eftir bakaralærlingi.

Lærutíðin er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Arbeiðstíðin er mest um dagin, hóast nakrar náttarvaktir eru.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
Tlf. 59 88 38 ella 31 21 61

*Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Sosialurin 341800

PF. VALDEMAR LÜTZEN
Tel. 317920 · Fax. 321904

## Saknar tú eina veruliga avbjóðing?

Vit søkja eftir lærlingi til Byggimarknað okkara. Tað er ein fyrimunur, um tú dugir at arbeiða við teldum. Annars ynskja vit ein persón, ið dámar at hava við fólk at gera og er løtt/løttur í sinni.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi arbeiðspláss, har tú sleppur at royna teg við at avgreiða kundar okkara, ið altíð vænta sær eina góða tænastu hjá Valdemar Lützen Byggibúð. Eisini kemur tú at arbeiða innan: Lásaútgerð, amboð, urtagarð, fiskireiðskap og annað innan byggimarknað.

Um hetta hevur tín áhuga, send umsókn til:

**Valdemar Lützen Byggibúð**
Skálatrøð 14
Postboks 20
110 Tórshavn
Att.: Høgni Lützen

Í avgreiðsluni á Skálatrøð fæst umsóknarblað og samstundis kanst tú síggja handil okkara. Umsóknarfreistin er tann 9. juli og lærutíðin byrjar tann 19. juli 2004.

## Mini gravmaskina

Alt arbeiði við mini gravmaskinu verður gjørt, so sum urtagarðar, smáir vegstubbar, grava fyri kaðalum, grava út fyri bilhúsum o.a.

Arbeiði við brekkara verður eisini gjørt.

**Fa. Hans P. Hansen**
477 Funningsfjørður
Fá meira at vita á tlf. 212631 ella 441631

*Vit taka minstu uppgávur í størsta álvara.*

## Grasturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Bíligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman íroknað streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

**Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.07.04**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

Sosialurin 341800

## Hølir til leigu

Nýumvæld hølir á 2. og 3. hædd í Málingahandlinum í J. C. Svabosgøtu 4 eru til leigu.

Hvør hæddin er uml. 150 fermetrar og er vælegnað til skrivstovu o.l.

Áhugaði kunnu venda sær til Jóannes Mouritsen, tf. 342526 ella jm@litaval.fo

LITAVAL P/F

Postboks 1019
100 Tórshavn

## Køkshjálp

Søkt verður eftir einum fólki at hjálpa til í køki okkara.

Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag kl. 10-14.

**Keypmaðurin »úti í Grønlandi«**
**Johannes Andreasen**
Grønlandsvegur 16 · 100 Tórshavn
Tlf. 312087

## Grundstykki ella trøð á Argjum/Tórshavn

**ynskist til keyps.**

Vinarliga upplýs matr. nr., stødd og ynski um kostnað.

Skriva til:
**Sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn
Bill. mrk. 08/06

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2948, Sp/f á Krossbakka, 650 Toftir

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Hans Jacob Skaale Olsen, 650 Toftir.
**Innkomin í nevndina:** Rúni Petersen, 600 Saltangará.

*Skráseting Føroya*
*tann 8. juni 2004*
*Kristin Balle*

-tað loysir seg



# Ársroknskapur 2003

## Rakstrarroknskapur

| 1000 kr. | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur v.m. | 18.448 | 20.257 |
| Rentuútreiðslur v.m. | 5.267 | 7.509 |
| **Netto rentuinntøkur** | **13.181** | **12.748** |
| Vinningur av partabrøvum | 73 | 69 |
| Kostnaður og provisjónsinntøkur | 2.165 | 2.092 |
| **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **15.419** | **14.909** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | 183 | 1.698 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 138 | 138 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **15.740** | **16.745** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 12.123 | 10.884 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 363 | 607 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 0 | 119 |
| Tap og burturleggingar | 998 | 1.776 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **2.256** | **3.359** |
| Aðrar óvanligar inntøkur | 0 | 0 |
| Aðrar óvanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| **Úrslit av vanligum rakstri undan skatti** | **2.256** | **3.359** |
| Skattur | 269 | 705 |
| **Ársúrslit** | **1.986** | **2.654** |
| **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| Ársúrslit | 1.986 | 2.654 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 35.913 | 33.178 |
| Broyting av roknskaparhátti viðvíkjandi útsettum skatti | 0 | 81 |
| Flutt frá øðrum grunnum | 163 | 119 |
| **Til nýtslu** | **38.062** | **36.032** |
| Flutt til grunnar | 163 | 119 |
| Framflutt úrslit | 37.899 | 35.913 |
| **Tilsamans** | **38.062** | **36.032** |

## Fíggjarstøða 31. desember

| 1000 kr. | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og ogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 7.143 | 6.362 |
| Ogn hjá fíggjarstovnum | 29.824 | 25.065 |
| Útlán | 260.976 | 240.245 |
| Lánsbrøv | 42.821 | 96.932 |
| Partabrøv | 2.364 | 500 |
| Kapitalpartar í associeraðum felag | 1.850 | 0 |
| Ítøkiligar ognir | 3.110 | 3.752 |
| Aðrar ognir | 138 | 170 |
| Tíðaravmarkingar | 328 | 621 |
| **Ognir tilsamans** | **348.554** | **373.647** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til fíggjarstovnar og tjóðbankar | 2.352 | 7.189 |
| Innlán | 300.040 | 325.804 |
| Onnur skuld | 1.262 | 1.834 |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 0 |
| Avsetingar til skyldur | 800 | 800 |
| Eftirsett kapitalinnskot | 4.000 | 0 |
| **Eginogn** | | |
| Ábyrgdarapeningur | 1.001 | 907 |
| Grunnar | 1.200 | 1.200 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 35.913 | 33.178 |
| Broyting av roknskaparhátti viðvíkjandi útsettum skatti | 0 | 81 |
| Flutt frá ársúrsliti | 1.986 | 2.654 |
| **Eginogn tilsamans** | **40.100** | **38.020** |
| **Skuld tilsamans** | **348.554** | **373.647** |
| Tøl, sum ikki eru við í fíggjarstøðu | | |
| Ábyrgdir o.a. | 2.718 | 2.979 |

SUÐUROYAR SPARIKASSI

REPROZ

## Vestmanna Skúli

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2004/2005 fyri lærara í farloyvi, lækkað tímatal o.a.; fulltíðarstørv og parttíðarstarv.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 470100 ella 424360, ella frá Jógvan í Dávastovu, formann í skúlastýrinum, tlf. 424566.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2004.

**Vestmanna Skúlastýri**
v/ Jógvan í Dávastovu
350 Vestmanna

Magnus Heinasonargøta 23. 1,
Postboks 205, FO-110 Tórshavn
Tel (+298) 31 89 03, Fart. (+298) 21 89 03
Fax (+298) 31 87 03

Rann Teld

**Bókhald - Skuldararøkt - Ráðgeving - Skattauppgerð**

## Matstova til sølu

Vegna viðskiftafólk selja vit vælrikna og vælvitjaða matstovu í leigaðum hølum í miðbýnum í Tórshavn.

Í matstovuni er alt nýmótans innbúgv og útbúnaður og verður hon seld um nóg høgt boð fæst.

Seriøs áhugaði kunnu venda sær til okkum á telefon 31 89 03 ella 21 89 03, telefax 31 87 03 ella t-post: rannteld@post.olivant.fo

## Chrysler Jeep Vøruvognur 4x4



Grand Cherokee Laredo
árg. 2001 · km. 107.000
Automatisk gear · el-rútar og spegl
**Til sølu um hóskandi boð fæst**
**TEL 22 54 78**

# ARBEIÐSMARKNAÐUR
*á www.portal.fo*

## Bilur til sølu

Ford Ecsort, vøruvognur, frá 1995 í góðum standi til sølu.

**Tlf. 598888 Tera**